# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



*Trý systkin: Gerda Simonsen, sum býr í Havn, føðingardagsbarnið Henry Davidsen, og Aleksandra Jensen, vanliga nevnd Sandra, sum býr í Keypmannahavn. Sandra fylti 90 ár 18. november*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Langabbabørn vóru eisini við*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*David Johannesen, prestur, ynskir Henry Davidsen tillukku við føðingardegnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Henry Davidsen 85 ár:

## Føðingardagurin hátíðarhildin í kirkjuni

Mikudagin 26. november var hátíðarhald í Sørvágs kirkju í sambandi við at Henry Davidsen í Sørvági fylti 85 ár. Henry er ein av veteranunum innan rutukoyring í Vágum.

Hátíðarhaldið í kirkjuni skuldi vera eitt yvirraskilsi fyri Henry. Presturin í Vágum, David Johannesen og familjan høvdu saman skipað fyri hesi løtuni. Henry er ein av trúgvu kirkjugangarunum í Sørvági.

Í kirkjuni bleiv sungið og David Johannesen helt eina talu, har hann m.a segði frá um lívið hjá Henry, sum bleiv einkjumaður í 1962 við trimum døtrum, sum vóru 19, 15 og 7 ára gamlar.

Tá hátíðarhaldið í kirkjuni var liðugt, varð føðingardagurin hildin hjá dóttrini, Ruborg, í Sørvági.

Henry er føddur og uppvaksin í Sørvági. Foreldrini vóru: Anna, f. Rubeksen, ættað úr Havn, og Jóan Pauli Davidsen, vanliga nevndur Dáva-Palli, úr Sørvági. Mamman doyði 96 ára gomul í 1982, meðan pápin doyði sum 54 ára gamal í 1943.

Henry giftist við Jenny, f. Thomassen, úr Sørvági, tey fingu tríggjar døtur: Ruborg sum býr í Sørvági, Anna Elisa, sum býr í Danmark og Joan, sum býr í Sørvági. Konan, Jenny, doyði í 1962, 42 ára gomul.

Lívsstarvið hjá Henry bleiv at vera bilførari. Hann arbeiddi hjá bretska hervaldinum undir krígnum og koyrdi m.a. lastbil hjá teimum. Í mong ár koyrdi hann rutukoyring við bussum hjá N. Niclasen og hjá Hjarvil Rasmussen í Sørvági. Hann koyrdi rutu til strandfaraskipið Vesturleið, sum legði at í Miðvági, og til rutubátin Ólavur, sum sigldi millum Fútaklett og Vestmanna. Seinni bleiv tað Oyrargjógv.

Í 1972 yvirtók Henry sjálvur rutukoyringina og koyrdi við sínum egnu bussum. Henry gavst við rutukoyringini, tá hann var umleið 70 ára gamal og svigarsonurin, Tage Jørgensen, tók yvir. Hesi árini síðan 1972 átti Henry sjey bussar.

Síðan Henry gavst at koyra, hevur hann havt betur tíð til bátin. Honum dámar sera væl at fiska. Hann svimur eisini nógv og er hvørja viku í svimjihylinum í skúlanum í Sørvági.



*Á fremsta bonki í kirkjuni: Henry situr her millum døturnar, v.m. Anna Elisa og h.m. Ruborg við lítlu Joan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Mimmi Nygaard 80 ár



Í dag, 28. november, fyllir Vilhelmina Nygaard, vanliga nevnd Mimmi, búsitandi í Keypmannahavn, 80 ár.

Mimmi er fødd og uppvaksin í Havn. Foreldrini vóru Mia, f. Arge, úr Havn, og Niels Nielsen, vanliga Niels í Heiðunum, ættaður úr Heiðunum.

Hon giftist við Heina Nygaard á Tvøroyri, og búði har í nøkur ár. Tey fingu fýra børn: Ása, Knútur, Leivur og Maria.

Mimmi flutti aftur til Havnar í 1954 og arbeiddi í Íslandi í nøkur ár. Einaferð í 60-unum flutti hon til Keypmannahavnar at búgva, har hon býr í dag. Hon arbeiddi við reingerð í nógv ár.

Sum ung var hon tiltikin fyri at duga væl at dansa. Hon hevur altíð verið Jim Reeves fan og hevði eisini okkurt brævaskifti við hann.

Ommusonur hennara, Marc Nygaard, sonur Mariu, er ein kendur fótbóltsleikari sum hevur spælt á danska landsliðnum og spælir í Hálandi í dag.



## Hálvur føroyingur í hálvfinalu

Sum vit nevndu í blaðnum 5. november, vikuna eftir at hálvi føroyingurin Gunnar Mikkelsen bleiv nummar tvey í "Stjerne for en aften", fríggjakvøldið 31. oktober, kom Gunnar víðari, og spennandi verður at fylgja við nú í kvøld, tá hálvfinalan verður.

Gunnar er 21 ára gamal, sonur Kristionnu Mikkelsen, dóttir Ebbemiu og Gunnar Holm Jacobsen. Pápin, Jørgen Mikkelsen, er dani, ættaður frá Samsø.

Gunnar hevur eins góðar møguleikar og hini, sum komu hálvfinaluna, at vinna kappingina. Føroyingar og hálvir føroyingar hava av álvara gjørt vart við seg í "Stjerne for en aften". So stórur spenningur er um úrslitið í kvøld.

## Adventshugni í Vestmanna

JÓLAHUGNI
*Tíðindaskriv*



Vestmanna Kirkjukór skipar fyri adventshugna í Auluni í Vestmanna skúla sunnudagin

Afturvendandi hugnaløtan, sum Vestmanna Kirkjukór plagar at skipa verður sunnudagin kl.18.

Til adventshugnan eru øll sjálvandi hjartaliga vælkomin, siga tey í Vestmanna. Aftur hesaferð hevur kórið minst til tey eldru í bygdini, og hava tey í pensiónistafelagnum fingið ein innbjóðing.

Adventshugnin er skipaður soleiðis, at kórið syngur nakrar jólasangir og eisini er eitt sindur av felagssangi á skránni.

Prestarnir Mogens Petersen og Inga Poulsen Dam luttaka eisini

Ein góður drekkamunnur er eisini at fáa saman við góðum smyrjubreyð og okkurt søtt eisini.

Kirkjukórið vónar stóra uppmøtingin, sum hevur víst seg hini árini, tí tess fleiri verða, jú hugaligari er at syngja felagssangin.

### Dagurin

28. november. Gunter. Teir vita ikki við vissu, hvønn verður meint við. Hann stóð í halgramannatali tíðliga í tíðini, fór burturúr, men kom so seinni aftur. Teir halda tó, at hesin Gunter ella Gunterus hevur verið navnframur biskupur í Týsklandi, sum doyði í 1045, 90 ára gamal.

## Et fotografi der viser et sekund

*"Et fotografi der viser et sekund*
*fra engang for længe siden,*
*hvor jeg som lille knægt*
*sejlede på Trangisvaag-fjorden*
*med Clement hja Sjúra i hans færøske båd.*
*Min lillebror var også med.*

*Det var dengang,*
*og alt er længe siden nu.*
*Jeg er blevet en anden siden dengang,*
*det er min lillebror også.*
*Clerment er borte,*
*og hans båd eksisterer næppe i dag.*

*Kun fjorden og det gamle fotografi synes uforandret."*

**Bjarni Åkesson Filholm**



*Yrkingin er skrivað av Bjarna Åkesson Filholm í sambandi við hesa myndina frá 60-unum.*

*Mynd: Palle Filholm*